**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 146/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin)** (Striking av handhavapartabrøvum og tøkniligar rættingar)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Poul Michelsen hevur lagt málið fram tann 7. mars 2019 og eftir 1. viðgerð tann 14. mars 2019 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 19. og 26. mars 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í vinnumálum, Poul Michelsen. Løgmansskrivstovan, Lógartænastan hevur eisini víst á, at onkrar tøkniligar broytingar eru ynskiligar í uppskotinum.

Endamálið við løgtingsmálunum 146/2018 og 147/2018 er í stuttum at seta í verk tiltøk fyri at fyribyrgja, at vinnulóggávvan verður misnýtt til skattaskjól og skattaundandrátt og at hava lógarverk á sama støði sum í grannalondunum og ES/EBS londunum í mun til at fyribyrgja hvítting og fígging av yvirgangi.

Nevndin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. § 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:
   "**2.** Í § 49 verða sum stk. 2-4 sett:
   "*Stk. 2.* Ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum kann ikki útinnna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin hevur givið fráboðan til felagið um sítt ognarhald.
   *Stk. 3.* Ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum kann ikki útinna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin er skrásettur í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 57 a ella § 58.
   *Stk. 4.* Høvuðsleiðslan hevur ábyrgdina av at hava eftirlit við, um ein ognari lýkur treytirnar í stk. 1-4.""

2. § 2, nr. 9 verður orðað soleiðis:
   "§ 1, nr. 118 verður orðað soleiðis:
   "**118.** Í § 246, stk. 3 og § 247, stk. 2 verður "samanleggingarætlanini" broytt til: "upplýsingum um ætlaðu samanleggingina, heruppií eina møguliga samanleggingarætlan".""

**3.** § 2, nr. 10 verður orðað soleiðis:
"§ 1, nr. 145 verður orðað soleiðis:
"**145.** Í § 265, stk. 2 verður "kloyvingarætlanini" broytt til: "upplýsingum um ætlaðu kloyvingina, heruppií eina møgliga kloyvingarætlan"."""

**4.** § 2, nr. 12 verður orðað soleiðis:
"§ 1, nr. 158 verður orðað soleiðis:
"**158.** Í § 279, stk. 1 verður "har umskapanarætlanin verður greinað og grundað" broytt til: "har greitt verður frá og grundgivið fyri umskapanini, heruppií eini møguligari umskapanarætlan, sbr. tó stk. 2"."""

**5.** § 4, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.
*Stk. 2.* § 49, stk. 3, sum ásett í § 1, nr. 2, verður sett í gildi við kunngerð frá landsstýrismanninum."

**6.** Í § 4, stk. 4 verður "nevndar í stk. 2" broytt til: "nevndar í stk. 3".

**Viðmerkingar**
Broytingarnar í nr. 1-4 eru tøkniligar broytingar gjørdar eftir tilmæli frá Lógartænastuni á Løgmansskrivstovuni, sum hevur víst á hesar tøkniligu villur. Harafturat eru broyting nr. 5-6 ávikavist ein tøknilig rætting og rætting av einari skeivari tilvísing.

Ein samd nevnd tekur við hesum broytingum undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 26. mars 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Jørgen Niclasen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Ingolf S. Olsen | Bjørn Kalsø | Jákup Mikkelsen |
| | Jógvan Skorheim | |